# Alternativ trætuloysn



*- Í nógvum málum, tá ið hjún skulu skiljast, er upplagt, at eitt millumgongufólk fyrst kemur inn í myndina ístaðin fyri at bæði tosa ígjøgnum hvør sín advokat, sigur Turið Debes Hentze, advokatur*

**- Sleppast kann undan nógvum rættarmálum, um ein meklari fær tey stríðandi at tosa saman og samráðast heldur enn við krøvum og ákærum at økja ósemjuna, sigur Turið Debes Hentze, sum hevur tikið til eitt skeið um alternativar trætuloysnir**

MEKLING

*Turið Kjølbro*

Miðskeiðis í november verður skipað fyri byrjunarskeiði í millumgongu. Millumgonga verður eisini nevnt mekling ella mediasjón. Hetta er ein arbeiðsháttur, sum snýr seg um at loysa ósemjur á tann hátt, at allir partar kenna seg sum vinnarar. Millumgongufólkið eggjar teim stríðandi til at skilja fyrimunin við sjálvi at tosa seg til rættis og sættis og samráðast heldur enn við krøvum og ákærum at økja ósemjuna. Millumgongufólkið leggur seg ikki sjálvt út í ósemjuna ella kemur við uppskotum um loysnir. Heldur er uppgávan hjá viðkomandi at stýra tingingunum millum partarnar soleiðis, at hesi sjálvi koma við uppskotum um loysnir og velja ta loysnina, sum teir halda vera ta bestu.

- Hugskotið við mediasjón er, at einki verður kroyst yvir høvdið á nøkrum, at partarnir tosa saman og lurta eftir sjónarmiðunum hjá hvør øðrum á ein hátt, at tey sjálvi meta, at tey eru komin fram til loysnina. Sleppast kann tá undan rættarmálum, sum ongantíð áttu at verið byrjað, sigur Turið Debes Hentze, advokatur.

Hesin arbeiðsháttur hevur víst seg sum eitt sera munagott amboð at loysa ósemjur av alskins slag innan vinnulív, í familjurættarligum trætum, innan skúlagátt, í revsimálum og yvirhøvur á øllum økjum.

- Í Føroyum eiga vit eisini at brynja okkum út við grundleggjandi vitan til henda arbeiðshátt. Roknast kann við, at tørvurin á vælskikkaðum millumgongufólkum innan leingi gerst veruleiki eisini her hjá okkum. Mediasjón er ógvuliga nógv brúkt í Onglandi, haðani hesin arbeiðsháttur stavar, og USA. Millumgonga verður meiri og meiri aktuelt, sjálv havi eg leingi havt ætlanir um at kunna meg nærri um henda arbeiðsháttin, og tað er grundin til, at eg havi tikið stig til skeiðið, sigur Turið Debes Hentze.

### Familjan fyrst

Á byrjunarskeiðinum verður størstur dentur lagdur á trætur innan familjurættarliga økið.

- Familjurættur er ógvuliga ítøkiligur og týdningarmikil. Í nógvum málum, tá ið hjún skulu skiljast, er upplagt, at eitt millumgongufólk fyrst kemur inn í myndina ístaðin fyri at bæði tosa ígjøgnum hvør sín advokat. Í Onglandi er tað vorðið til eitt krav, at fólk ikki sleppa at skiljast fyrr enn eitt millumgongufólk hevur verið inni í myndini. Í Noreg bendir nógv á, at hetta eisini verður eitt krav, og í Danmark síggja vit, at mediasjón er vorðið eitt vanligari tilboð í amtunum. Nú arbeitt verður við nýggjari lóg á familjurættarliga økinum í Føroyum, eigur mekling at koma inn í lógarverkið. Í okkara hjúnabandslóg stendur, at eingin skal skiljast fyrr enn partarnir hava verið til mekling, men sum er hava fólk lítlar og ongar møguleikar, um tey ynskja meklara inn í myndina, sigur Turið Debes Hentze.

At størsti denturin á byrjunarskeiðnum verður lagdur á familjurættarliga økið, eigur ikki at halda teimum aftur, sum hava áhuga í trætuloysnum innan onnur øki.

- Skeiðið fevnir eisini um eina almenna og grundleggjandi vitan um, hvat mediasjón snýr seg um, og um tær mannagongdir, sum nýttar vera. Mediasjón verður brúkt alla staðni, har tvístøður eru, sum ikki kunnu loysast, sigur Turið Debes Hentze.

Á skeiðinum verður ástøðilig framløga og praktisk uppgávuloysn. Undirvísararnir, Vibeke Vindeløv, dr.jur., og Pia Deleuran, advokatur, virka báðar sum millumgongufólk. Tann fyrrnevnda hevur skrivað doktarritgerð um alternativa trætuloysn, og tann seinna granskar í evninum tvístøður.

Skeiðið vendir sær serliga til advokatar, sálarfrøðingar, dómarar, sosialráðgevarar, málsviðgerðarar, og onnur, sum dagliga arbeiða við trætuloysnum og semjuroyndum, umframt onnur, sum hava áhuga í hesum evni og ynskja størri kunnleika. Ætlanin er seinni at hava eitt víðkað skeið til teirra, sum ynskja fullan førleika at virka sum millumgongufólk. Skeiðið, sum verður hildið á Hotel Hafnia, er treytað av, at í minsta lagi 10 fólk tekna seg.

# Hart lív at flúgva

**Týska flogfelagið, Lufthansa, væntar sær ein ordiligan, fíggjarligan lúsing, skrivar danska blaðið Stand By í vikuni**

FLOGFERÐSLA

Týska flogfelagið Lufthansa væntar ein inntøkumiss up á 500 milliónir Euro, ella umleið 3,7 milliardir danskar krónur, seinasta árfjórðing í ár í mun til somu tíð í fjør.

Tølini eru at síggja í einum internum arbeiðsskjali hjá felagnum, sum týsk bløð hava fingið hendur á, skrivar Stand By, sum aftur hevur Berlingske Tidende Erhverv sum keldu.

Ein tann største orsøkin til inntøkumissin er beinleiðis avleiðingin av yvirgangsatsóknunum í USA tann 11. september.

Síðan tá hevur Lufthansa flutt í meðal 30.000 ferðafólk færri - um dagin - enn felagið gjørdi áðrenn hendingarnar í USA.

Samanborið við sama tíðarskeið í fjør er sølan hjá Lufthansa minkað við ikki færri enn 50 milliónum Euro um vikuna, skrivar blaðið.

**ej**

# Prískríggj yvir Europa



*Tað er vorðið ein fjórðing bíligari at flúgva við KLM úr Hollandi*

**KLM og SAS eru farin at kappast um hollendsku flogferðafólkini. Feløgini undirbjóða hvørt annað í ferðaseðlaprísinum**

FLOGFERÐSLA

Eins og Atlantsflog og Maersk Air kappast um at bjóða føroyingum bíligar ferðaseðlar fram móti jólum, er sama støðan galdandi í Hollandi, har KLM og SAS eru farin í rættiligt prískríggj.

Hollendska flogfelagið KLM hevur lækkað allar ferðaseðlaprísir úr Hollandi við 25%, skrivar Jyllands Posten í vikuni. Tískil hevur felagið eftir øllum at døma byrjað eitt sonevnt prískríggj, verður mett.

SAS svaraði beinanvegin aftur við at bjóða avsláttur heilt upp til 40% á Amsterdamrutunum.

Sølustjórin hjá SAS, Palle Christensen, sigur við Jyllands Posten, at lækkingin er beinleiðis avleiðing av tiltakinum hjá KLM. Hann sigur eisini, at tað verður umhugsað í SAS, um lækkingar eisini skulu gerast í prísunum á øðrum europeiskum rutum.

Kappingin millum hesi bæði flogfeløgini kann enda við, at eisini onnur europeisk flogfeløg kenna seg noydd at lækka sínar prísir.

Og alt stavar frá, at fólk eru so bangin fyri at flúgva síðan tann 11. sptember, at neyðugt er við ógvusligum tiltøkum fyri at lokka fólk aftur í luftina, skrivar Jyllands Posten.

**ej**



# Vil broyta reglu um sjúkrafráveru

*Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður, heldur, at landsstýrismaðurin við vinnumálum hevur broytt hugsan, síðan hann svaraði fyrispurningi í tinginum týsdagin*



**Útlit eru til, at eitthvørt fer at henda við 120 daga regluni, sum er regla um, at starvsfólk kunnu sigast upp vegna ov nógva sjúkrafráveru. Landsstýrismaðurin við vinnumálum hevur broytt støðu síðan týsdagin, tá hann svaraði fyrispurningi í Løgtinginum**

ARBEIÐS-MARKNAÐUR

*Edvard Joensen*

Landsstýrismaðurin við vinnumálum hevur sett fólk at viðgera Starvsmannalógina, har millum annað reglan um 120 daga sjúkrafráveru er ein partur. Talan er um broytta støðu í mun til svarið, hann gav upp á fyrispurning í Løgtinginum týsdagin, sigur løgtingsmaðurin, sum setti spurningin.

Hans Pauli Strøm tingmaður hjá Javnaðarflokkinum, spurdi tann 5. september í ár landsstýrismannin, nær hann ætlar at fremja løgtingssamtyktina frá 24. januar 2001 um at leggja fyri Løgtingið uppskot til broytingar í galdandi lóggávu fyri at fyribyrgja, at starvsfóplk verða uppsøgd við styttari freist orsakað av sjúku.

Takan er um ta sonevndu 120 daga regluna, sum gevur arbeiðsgevara rætt til at siga fólki upp, um tey í einum 12 mánaða skeiði hava verið meira enn 120 dagar burtur frá arbeiði orsakað av sjúku.

Í lógini um starvsmenn, sum er frá 1958 er ein regla, sum gevur arbeiðsgevaranum rætt til at seta í einstøk setanarskriv, at hann skilar sær rætt til at siga fólki úr starvi, um sjúkrafrávera verður meira enn 120 dagar í einum 12 mánaða skeiði.

Hetta hevur ikki verið brúkt fyrr enn fyri stuttum, tá Fíggjarmálastýrið fór at seta hetta í setanarskriv hjá starvsfólki, sigur Hans Pauli Strøm.

Tað ger, at fólk, sum kunnu hava verið so mikið leingi í starvi, at tey hava vunnið sær seks mánaða uppsagnartíð, nú kunnu sigast upp við styttri freist.

Tað er hetta, sum uppskotsstillarin vil hava tikið burtur aftur, so tann vanliga, sáttmálafesta uppsagnarfreistin altíð verður galdandi.

### Einmælt samtykt

Hans Paula Strøm, løgtingsmanni, er farið at leingjast eftir einum útspæli frá landsstýrismanninum við vinnumálum.

Serliga tí, at at samtyktin í løgtinginum tann 24. januar var einmælt, vísir hann á. Tað vóru 27 atkvøður fyri uppskotinum, meðan eingin var í móti og heldur eingin blonk atkvøða.

Hóast tað er einki frætt aftur frá landsstýrismanninum, og heldur ikki stendur nakað á lógarlistanum yvir tey lógaruppskot, sum ætlanin er at leggja fram í hesum valskeiðnum, um at nakað verður gjørt við hetta málið.

Á løgtingsfundi tann 23. oktober svaraði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, fyrispurninginum frá Hans Paula Strøm.

Men tað svarið var ikki nøktandi, sigur Hans Pauli Strøm, sum fýlist á, at grundgevingarnar, sum landsstýrismaðurin kom við í svari sínum, vóru ikki haldgóðar.

### Ótrygg grund

Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður, heldur, at støðið undir svarinum hjá landsstýrismanninum er ikki heilt trygt.

Hann brúkar tilmæli frá Vinnunevndini sum grundgeving fyri svari sínum.

– Men tað heldur ikki, sigur Hans Pauli Strøm, tað er ikki nakað svar soleiðis, tí petti úr tilmælinum hjá Vinnunevndini eru tikin burtur úr heildini, so tey passa til tað, sum landsstýrismaðurin ætlar at svara.

Víst verður millum annað á, at Vinnunevndin heldur, at um 120 daga reglan verður tikin av, fer tað mest at raka smáar fyritøkur á smáplássum. Serliga verður hugsað um smáar bygdarhandlar og tílíkar fyritøkur, sum eiga at hava rætt til at siga fólki upp, um tey eru nógv burtur vegna sjúku, sigur landsstýrismaðurin.

Til tað sigur Hans Pauli Strøm, at eftir at hava tosað við eitt nú S & K, sum er fakfelagið hjá handilsfólki, hevur hann fingið at vita, at slíkt kenna tey als ikki.

### Væntandi arbeiðsførleiki

Hinvegin hevur hann víst á, at tað eigur at verða gjørt brúk av grein í Forsorgarlógini, sum heimilar at geva lønarískoyti til fólk, sum eitt nú av sjúku missa fulla arbeiðsførleikan.

Tað vil siga, at har fólk orsakað av sjúku, vanlukku ella øðrum slíkum, noyðast at vera nógv burtur frá arbeiði, kann arbeiðsgevarin fáa ískoyti til lønina frá Almannastovuni.

Tað hjálpir ikki bara arbeiðsgevaranum fíggjarliga, men í nógv størri mun starvsfókinum persónliga, vísir Hans Pauli Strøm á.

Hann sigur, at tað er einki so slítandi hjá einum menniskja sum at missa sambandið við arbeiðsmarknaðin. Tað forkemur fólki stutt og greitt, sigur hann.

Millum annað við hesum í huga er tað, at hann vegna Javnaðarflokkin í december í fjør legði uppskot til samtyktar fyri tingið um at heita á landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið uppskot til broytingar í galdandi lóggávu fyri at fyribyrgja, at starvsfólk verða uppsøgd við styttari freist orsakað av sjúku.

### Landsstýrismaðurin vendir

Tá landsstýrismaðurin svaraði fyrispurninginum týsdagin, sá einki út fyri málinum, sigur Hans Pauli Strøm. Líkt var til, at hann ikki ætlaði at fylgja áheitanini. Við ymsum grundgevingum.

Millum annað segði hann, at málið var so stórt, at hann helt tað ikki vera rætt at seta tað á lógarlistan, tí ivasamt fór at vera, um lógin kundi endurskoðast og leggjast fram í hesi tingsetuni.

Men tað er ein vánalig undanførsla, heldur Hans Pauli Strøm, sum vísir á, at talan var als ikki um at endurskoða alla starvsmannalógina frá 1958, men bert strika eitt brot í henni.

Undir tingviðgerðini kom fram, at eisini floksfelagaðar hjá landsstýrismanninum tóku undir við hugsanini um at strika ásetingina.

Um tað hevur havt ávirkan á støðutakanina hjá landsstýrismanninum, dugir Hans Pauli Strøm ikki at siga. Men mikudagin, dagin eftir tingviðgerðina, boðaði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, kortini frá, at hann hevur sett fólk í Vinnumálastýrinum at hyggja at lógini og uppskotinum til samtyktar við tí fyri eyga at gera broytingar í 120 daga regluni.

Sosialurin royndi í gjár at fáa orð á Bjarna Djurhom, landsstýrismann, men hann var upptikin av fundarvirksemi, og tískil eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá honum, áðrenn blaðið fór til prentingar.